## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og norði og ælingur, partvís vátakavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷1 og +2 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði, sunnudagin minni vindur. Okkurt kavaælið, men eisini sólglottar og hitin um frostmarkið.

# Helmut Schmidt vitjaði í Føroyum í 1957

Nú Føroyar og Týskland skulu spæla sín fyrsta landsdyst í fótbólti kundi verið áhugavert at trivið í tað, sum fyrrverandi týski kanslarin, Helmut Schmidt, hevur skrivað um sína vitjan í Føroyum í 1957, í endurminningum sínum: »Týskland og grannar tess«

»Stóri áhugi okkara fyri Norðurlondum gjørdi, at Loki og eg í 1957 gjørdu eina ferð til Føroya. Vit koyrdu fyrst norður til Jútlands. Síðani um Lítlabelt til oynna Fjón og hiðani um Stórabelt til Keypmannahavnar, har vit fóru umborð á ein danskan dampara. Leiðin gekk nú norður í Kattegat og Skagerak og víðari út í Norðsjógvin á veg til Tórshavn á Streymoynni í Føroyum. Tá ið vit løgdu at bryggju var næstan einki fólk at síggja. Seinni fingu vit at vita, at ólavsøkudagur var, tjóðarhátíð føroyinga, og somuleiðis veitsludagur og at dúgliga hevði verið brúkt av árligu brennivínsskamtanini, sum ein bara kundi njóta gleði av, um kvittan var fyri, at skatturin var goldin. Helst høvdu tey tømt allar fløskur og lógu nú í djúpum svøvni.

Loki og eg kendu okkum sera væl á hesum kargu oyggjum. Fólkið tosar sítt egna fornnorrøna mál, sum kanska minnir mest um norskt. Í málinum eru nógv sjálvljóð og mergjandi orðafelli, sum ikku eru so mong eftir av í hinum skandinávisku málunum. Eini 95% av íbúgvunum liva av fiskivinnu og hvalaveiðu. Ikki sóu vit stórvegis viðavøkstur, bara smá eikitrø og berjarunnar, sum tey høvdu plantað í gørðum um húsini. Lítið var av grønmeti, men vit varnaðust, at tey veltu epli til egið brúk, soleiðis sum vit hjá okkum eisini hava blomstur í køssum á svalanum. Vit ótu fyri tað mesta fisk. Eina ferð um vikuna fingu vit tvøst, og á heimferðini sóu vit hópin av graindahvali. Av húsdjórum sóu vit bara hund og seyð, men har var ørgrynni av ymiskum másasløgum, sum stoyttu seg við nógvari ferð niður á okkum, so vit noyddust at taka stavin til verju.



Oyggjarnar eru úr basalti, sum manga staðni standa tær steyrrættar úr havi. Fyri at koma úr einari bygd í aðra, mást tú ferðast við báti.

Í seinna kríggi løgdu bretar ein flogvøll á einari av høvuðsoyggjunum, men hann verður ikki brúktur í dag. Fleiri hermenn eru grivnir á oyggjunum.

Ein dagin vóru vit til gongu til ein bóndagarð hinumegin høvuðsoynna. Vit fingu at vita, at mjørki brádliga kundi koma á okkum, og tí høvdu vit tikið við okkum eina skipskumpass í trækassa. Hon kom væl við, tí mjørki legðist á okkum. Eftir at hava gingið í tríggjar tímar eftir grýtutum lendi komu vit at enda oman í bygdina. Garðurin var laðaður úr gróti og harafrat vóru tríggjar smáar kirkjur. Á einari vóru bara veggirnir eftir. Húsini vóru smá við flagtaki. Bóndin segði okkum, at garðurin í Kirkjubø var kongsgarður.

Hesin bóndin var sera belisin maður, sum var kønur í gomlum skriftum og bókum. Eg skilti, at hann eisini var rithøvundi. Á fingrinum hevði hann gyltan ring við ravsteinsmynd í. Hann hevði funnið hann, ein dagin tá ið teir gróvu tætt við garðin, og hann helt, at hesin ringur einaferð hevði sitið á onkrum vígdum biskupsfingri í Róm. Hetta ljóðaði trúligt, men tað tókti okkum løgið, at hann gekk við ringinum í dagligum arbeiði«.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | 11 |
| Halifax | 16 |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 10 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 7 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 3 |
| Warzawa | 4 |
| Kiev | 3 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 19 |
| Róm | 20 |
| Malorca | 24 |
| Athen | 22 |
| Malta | 22 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 17 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 23 |
| New York | 12 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 21 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst, 1032 hPa yvir Grønlandsfjørðinum mennist og ein kuldabrúgv yvir Íshavinum er á veg suðureftir.




Hátrýstið yvir Grønlandi stendur í stað og kuldabrúgvin millum Eystur-Grønland og Noreg kemur móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/10 kl. 06[00]– 14/10 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 7,3°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,5 mm – mált frá 13/10 kl. 06[00]– 14/10 kl. 06[00]
Avfallið higartil í oktober: 25,4 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

6. okt.: Mánin næstur jørðini
13. okt.: Fyrra kvarter
20. okt.: Mánin longst frá jørðini
21. okt.: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 16. okt. | 04.01 | 16.28 | 03.01 | 15.28 | 03.16 | 15.43 | 06.01 | 18.28 | 07.01 | 19.28 | 02.16 | 14.43 | 01.16 | 13.43 | 04.16 | 16.43 | 05.16 | 17.43 | 03.46 | 16.13 | 05.01 | 17.28 |
| 17. okt. | 04.54 | 17.14 | 03.54 | 16.14 | 04.09 | 16.29 | 06.54 | 19.14 | 07.54 | 20.14 | 03.09 | 15.29 | 02.09 | 14.29 | 05.09 | 17.29 | 06.09 | 18.29 | 04.39 | 16.59 | 05.54 | 18.14 |
| 18. okt. | 05.34 | 17.53 | 04.34 | 16.53 | 04.49 | 17.08 | 07.34 | 19.53 | 08.34 | 20.53 | 03.49 | 16.08 | 02.49 | 15.08 | 05.49 | 18.08 | 06.49 | 19.08 | 05.19 | 17.38 | 06.34 | 18.53 |
| 19. okt. | 06.13 | 18.33 | 05.13 | 17.33 | 05.28 | 17.48 | 08.13 | 20.33 | 09.13 | 21.33 | 04.28 | 16.48 | 03.28 | 15.48 | 06.28 | 18.48 | 07.28 | 19.48 | 05.58 | 18.18 | 07.13 | 19.33 |

5 707265 100036 >